# Aldursforsetin vann

70 ára gamli Victor Korchnoi vann óvæntað sterku kapingina í Biel, Sveis. Hann byrjaði væl, og lá hálvt stig fremstur tá komið var hálva leið, og soleiðis varð eisini endastøðan. Korchnoi vann loksins við seks stigum av tíggju møguligum, Svidler fekk hálvtsætta stig meðan Boris Gelfand heldur skuffandi ognaði sær triðja plássið við fimm stigum. Javnir á fjórða og somuleiðis aftasta plássi, vórðu Alexander Grischuk, Joel Lautier og Yannick Pelletier.

Fá vóru tey sum høvdu væntað at sæð Korchnoi aftur á sigurspalli, men sum hann sjálvur sigur, so hevur hann ongar veruligar talvambitiónir, uttan tað at hann ætlar at vísa teimum ungu, at enn er dugur í honum!

*-cens*

# Talvið hesa vikuna

Talvið niðanfyri er frá landsdystinum í 1981, sum bleiv telvaður í Hoydølum. Íslendingar vunnu tepran samanlagdan sigur. Tað varð í hesum árið har sandavágsmaðurin Torkil Nielsen av álvara menti seg sum telvari. Hann var tá 17 ára gamal og hevði Áskell Orn Kárasson, sum nú er forseti í Skáksamband Íslands, yvir av sær á øðrum borði.

**Áskell O. Kárasson (ÍS) — Torkil Nielsen (FO) Landsdystur í 1981. 2. borð.**

1.d4 Rif6 2.c4 g6 3.Ric3 Bg7 4.e4 d6 (Kongaindisk byrjan) 5.Be2 0-0 6.Bg5 c6 7.h4 Fa5 8.Fd2 e5 9.d5 cxd5 10.cxd5 Ribd7 11.f3 Ric5 [11...a6 hevði verið rætti leikur] 12.Rib5 Fxd2+ 13.Bxd2 Rd8 14.b4 Ria6 15.g3 Rie8 16.Bd3 Bd7 17.Rie2 Bxb5 18.Bxb5 Riac7 19.Bd3? [19.Bc4 og svartur hevur at kalla einki mótspæl]



19...Rixd5! 20.exd5 (Ivasamt. Betri hevði verið at roynt seg við h5 til dømis) 20...e4! (Liður í planini) 21.Rc1 exd3 22.Rif4 Be5 (Restin er teknikkur, sum Torkil tann dagin í dag enn mynstrar) 23.g4 Bxf4 24.Bxf4 Rif6 25.Bg5 Re8+ 26.Kd2 Rixd5 27.a3 h6! 28.Bxh6 Kh7 29.Bg5 f6 30.Kxd3 fxg5 31.hxg5+ Kg7 32.Kd4 Re5 33.Rh3 Rif4 34.Rc7+ Kg8 0-1

# Rógvi Johansen vann Team Danmark test.

**Vágbingurin sýndi enn einaferð, hvussu góð evnini eru á einum hjólhesti, men hóast formurin neyvan hevur verið betri, so verður hann ikki við, tá súkklast skal um FM**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*



*Royndirnar, sum súkklararnir skuldu ígjøgnum, fóru partvíst fram á laboratoriinum hjá Team Danmark*

Vágbingurin Rógvi Johansen, hevur luttikið í ymiskum testum á Team Danmark centrinum í Odense, testinar vóru gjørdar í samband við eitt »forskningsprojekt« sum var gjørt í samstarvi millum Odense Universitet og Team Danmark.

Í hesum sambandi skuldu teir testa eina røð av rættiliga servandum um súkklarum. Súkklarum við drúgvum royndum í danska A-bólkinum.

Allar royndinar vóru undir strongum eftirliti av læknum og Team Danmark laborantum.

## Vann greitt

Royndirnar, sum súkklararnir skuldu ígjøgnum vóru hesar:

-Ein submaksimal (á fløtum og hellandi rennibandi) og ein maksimal test á (hellandi rennibandi). Alt hetta varð gjørt á súkklu.

-Ein submaksimal-test á baghjólergometur.

- Ein sonevnd feltroynd, sum varð koyrd í Odense, og sum mest var álíkt einum einkulstarti.

Tíggju súkklarar vóru valdir út til at taka lut í royndunum, og millum teirra, sum Rógvi altso vann á, vóru millum aðrar Flemming Witt (F.B.C.), sum herfyri varð nr. 10 í DM í einkulstarti, Michael Larsen (Team Glud/Marstrand), Ole Ørsted (O.C.K.) og Jannik Petersen (Hammel Cykelklub). Sum kunnugt koyrdi hesin seinasti í bláu førara-troyggjuni í Statoil kring Føroyar kappingini, áðrenn hann tók seg úr kappingini.

Tað eydnaðist Rógva at gerast besti súkklarin í royndini, og ikki kann sigast annað enn, at talan var um ein sannførandi sigur.. Rógiv koyrdi 381 watt í felttestini, og var hetta heili 41 watt meira enn næsti súkklarin, sum var hin hálvprofessionelli Michael Larsen. Munurin her var somikið stórur, at hetta eisini gjørdi Rógva til greiðan vinnara av samlaðu royndini.

Sjálvur er Rógvi sera fegin um úrslitið sum staðfestir at hansara støði er sera høgt eins og niðurstøðan má vera, at hann hevur framúr evni sum einkultstart súkklari.

## Ikki til FM

Annars boðar Rógvi Johansen nú frá, at hann ikki verður við til FM-kappingarnar, sum verða hildnar í august mánaði. Hann sigur seg vera vónbrotnan um viðferðina, sum hann og fýra danskir súkklarar fingu frá Tórshavnar Súkklufelag og Jens Glerup undir Statoil kring Føroyar kappingini, og at hann tískil ikki er serliga motiveraður at taka lut í FM kappingini, sum TSF skipar fyri.

Tað er sjálvandi við ringum tannabiti, at Rógvi hevur tikið hetta stig. Hann hevur vunnið einkultstartin her heima seinastu seks árini, og eisini hevði hann ætlanir um at gera ein vørr á hinum teinunum, sum verða súkklaðir.

-Eg velji tí heldur at stilla upp í stóru kappingini »Fyn Rundt«. Hettar er ein av teimum størru kappingunum, sum eru í danmark,. Ein av teimu har fleiri kend nøvn eru við. Tað skal tó ikki vera nøkur loyna, at fegin vildi koyrt FM-kappingina. Eisini hóast hetta er ein minni kapping enn Fyn Rundt.

- Serliga er tað í ár áhugavert, at FM-kappingin fyri fyrstu ferð skal skipast í Suðuroynni. Suðuroyggin er mín heimavøllur, og tí var eg undan Statoil kappingini var eg sera spentur til FM, men soleiðis bleiv tað bara ikki, sigur ein vónbrotin Rógvi Johansen at enda.

# Íslendingar bjóða av

**Komandi vikuskifti leita telvarar úr grannatjóð okkara hendan vegin. Landsdystur er nevnliga á skránni.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Í 1974 samdust Talvsamband Føroyar og Skáksamband Íslands at fara undir regluligt landsdystarsamband, og í 1975 varð sostatt fyrsti dystur leiktur. Tvey tey fyrstu árini nýttu íslendingar teirra bestu telvarar, men skjótt sást at hesir vóru nógvir klassar betri enn okkara menn og síðani triðja dystin í 1979 hava bert telvarar uttanfyri Reykjavík mannað íslendska liðið, og hevur hetta eisini givið meira javnvág í dystunum.

Telvað hevur verið annaðhvørt ár seinastu tjúgu árini, seinast í Akureyri í 1999. Tá endaði dysturin 10-10. Í 1997 tá telvað varð í Føroyum, endaði dysturin somuleiðis 10-10, men báðir dystirnir hava íslendingar vunnu vegna fleiri stig á fremru borðunum. Hesi 26 árini telvað hevur verið landsdystir, hava íslendingar vunnu nógv flestar ferðir, men sjáldan hevur munurin verið stórur.

Ikki bert talv hevur verið á skránni tá tjóðirnar báðar hittast í talvørindum. Sanniliga hevur eisini verið høvi til útferðir og veitslur, sum hava viðført vinarsambond uttanum sjálvt telvingina. Tað er nakað serligt tá føroyingar og íslendingar hittast.

## Sterkt føroyskt lið

Fyrireikingarnar til dystin komandi vikuskifti eru byrjaðar og nógvir av okkara fremstu telvarum hava játtað seg tøkar. John Arni Nilssen telvar í løtuni NM í Bergen, hann hevur í skrivandi løtu hálvtannað stig av tveimum, og kann tí ikki vera við í landsdystinum. IM John Rødgaard verður væntandi við, meðan ivamál er um Flóvin Tór Næs og Rógva W. Rasmussen. Torbjørn Thomsen, Ólavur Simonsen, Rani Nolsøe og Carl Eli N. Samuelsen hava allir játtað seg klárar.

Eyðun Nolsøe og Jens Kristian Hansen verða báðir burturstaddir. Maður kemur tó í mans stað, og tí er eingin orsøk at óttast, tí næstir í røðini eru eitt nú unglingarnir Martin Poulsen og Olaf Berg, og teir meira royndu Steintór Rasmussen, Terji Petersen, Finnbjørn Zachariassen og Martin Brekká. Hesir og fleiri aðrir eru tí um boðið.

10 mans manna liðini. Telvað verður tvíumfar, eitt leygardagin og eitt sunnudagin, í hølum Havnar Telvingarfelags.

**Kelda:** *»Føroysk telving í 20. øld« eftir Suna Merkistein*



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3217

Navn: Sp/f Inn
Adressa: c/o Jaspur Johannesen, Marknagilsvegur 10, 100 Tórshavn
Kommuna: 460 Norðskáli, Sunda Kommuna
Stovningardato: 16.07.2001
Viðtøkudato: 16.07.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Jaspur Johannesen, Marknagilsvegur 10, 100 Tórshavn.
Stjórn: Jaspur Johannesen, Marknagilsvegur 10, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av stjóra felagsins.
Grannskoðari: : Sp/f AB-grannskoðan, Sleipnisgøta 12, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 16.07.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og tað sum stendur í samband við hetta.

Skráseting Føroya tann 2. august 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3214

Navn: Sp/f INT Promotion
Adressa: Jørundsgøta 65, 188 Hoyvík.
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 06.07.2000
Viðtøkudato: 06.07.2000
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Regin Vágadal, Jørundsgøta 65, 188 Hoyvík.
Stjórn: Regin Vágadal, Jørundsgøta 65, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið av stjóranum.
Grannskoðari: : Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 06.07.2000 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at fyrireika tiltøk av einumhvørjum slag og allan handil í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 2. august 2001

Kristin Balle





## Bilur til sølu

Toyota Carina st. car.

**P/F Fótbúni**
Tlf. 311705

## Føroya Psoriasisfelag

Vit vilja hervið boða frá, at komandi viðgerðartúrur fyri psoriasis verður á Bláa Lónið í Íslandi 7. sept. og heim aftur 4 vikur seinni.

Tey, ið hava tørv á viðgerð, fara til egnan kommunulækna, læknin fyllir umsóknarblaðið út og sendir tað til húðlæknan.

Umsókn skal latast inn seinast 10. august 2001. Eru ivamál hesum viðvíkjandi, eru tit vælkomin at ringja 424179.

*Vinarliga*

**Føroya Psoriasisfelag**

## Regatta 2001

**Um viðrar verður tann árliga regatta-siglingin fríggjadagin 10. august**

Siglt verður av Eiði kl. 19.30, verða í Hósvík uml. kl. 22.30.

Allir bátar kunnu luttaka.

Prísur 100 kr. pr. persón. Heitur matur íroknaður og ábit leygarmorgunin.

**Dansur**
verður í Bygdarhúsinum frá kl. 23.30. Orkestrið Moonshot úr Vestmanna spælir. Kostnaður 80 kr.

Møguleiki er at seta tjald upp.

**Leygardagin kl. 14.00**
verður siglt út til Nólsoyar, har Ovastevna er. Møguleiki er at keypa okkurt til matna.

Møguleiki er at seta tjald upp.

**Tilmelding**
á tlf. 422589, 422578, 422368, 422148, 422096 ella e-mail: regatta2001@yahoo.dk
Til ber at gjalda á konto 9181.133.309.9 í Føroya Sparikassa. Viðmerkjast skal bátanavn og tal av persónum.

Seinasta freist at tekna seg er týsdagin 7. august kl. 20.00.

## Eydnuhjól

Haldórsvíkar Avhaldsfelag hevur eydnuhjól 02. sept. 2001. Um nakar vil stuðla við lutum, kunnu tey venda sær til ein av nevndarlimunum: Paulivar tlf. 423319, Katrin tlf. 423491, Hallgerð tlf. 423368, Hjalma tlf. 423343, Hansa tlf. 423348.

**Nevndin**

## Frá Happadráttinum

Seinasti søludagur til 1. drátt er 16. august

Seðilin spælir við í trimum dráttum

70% av søluvirðinum verður latið til vinningar

HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTINUM

**KIA CARNIVAL**

2.9 Dohc Turbo-Diesel16 V, 126 HK, 5 hurðar



Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.

D. B. Bilar
Tel. 310 600

Sosialurin - 311820

## Nýtt skeið

byrjar hóskvøldið
9. august
kl. 19.00



Ole Lykke, tel. 220 972
Hugo Kristiansen, tel. 225 225
Johan Beder, tel. 210 821

Sosialurin - 311820

Sosialurin -har tað hendir

## Sky digital og Orbit Network.

Kort og móttakari, alt fæst nú á einum stað.

Kortsáttmála beinleiðis við Sky Digital.

Sjálvandi tann tryggasta loysnin.

Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tlf 421411 ella 215328




Fígging kann útvegast